# Dagsformurin verður avgerandi



*Bárður Olsen, ið hevur verið einastandandi fyri B36 í ár, skal í hálvfinuluni aftur møta barndómsfelagnum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**LØGMANSSTEYPIÐ** EB/Streymur skal spæla ímóti oddaliðnum í Vodafonedeildini, B36. Hetta gjørdist greitt eftir at lutakast var mánakvøldið, um hvussu spælast skal í hálvfinalunum í kappingini um Løgmanssteypið. Bæði Heðin Askham og Sigfríður Clementsen siga seg vera nøgdar við lutakastið

Ólavur Øre Hansen

Seinastu árini hevur EB/Streymur staðið seg sera væl í steypakappingini. Seinastu trý árini hava sundalagsmenn verið í finaluni um Løgmanssteypið. Teir vunnu kappingina í 2007 og 08, meðan Víkingur foraði teimum í at vinna steypið til ognar í fjør.

Spurningurin er so, um EB/Streymur skal koma í finaluna um Løgmanssteypið fjórða árið á rað, ella B36 klárar at steðga sundalagsmonnum, eins og teir gjørdu í fyrsta umfari av landskappingini í ár.

### Javnir dystir

– Fyri okkum var tað líka mikið hvørjum vit skuldu møta í hálvfinaluni, sigur Sigfríður Clementsen, og heldur fram, at tað nyttar ikki at brúka orku uppá slíkt, sum vit onga ávirkan hava á.

– At lutakasti hevði við sær at mótstøðuliðið gjørdist EB/Streymur er bara stuttligt, sigur fyrrverandi EB/Streyma venjarin, sum er nøgdur við lutakastið.

Hóast B36 hevur fingið eina sera góða byrjan á landskappingina, har teir millum annað hava vunnið á EB/Streymi, so metir Sigfríður Clementsen ikki at B36 er favorittur at vinna hálvfinaluna móti EB/Streymi.

– Heldur verður talan um tveir javnar dystir, har dagsformurin verður avgerandi, sigur B36 venjarin.

– Um nakað av liðunum hevur ein lítlan fyrimun, so er tað EB/Streymur, tí teir hava heimavøll í seinra dystinum, sigur Sigfríður Clementsen at enda.

> **Um nakað av liðunum hevur fyrimun, so er tað EB/Streymur, tí teir hava heimavøll í seinra dystinum**

### Væl nøgdur við lutakastið

Venjarin hjá EB/Streymi, Heðin Askham sigur seg vera væl nøgdan við lutakastið, sum hevur við sær at sundalagsmenn í hálvfinaluni í steypakappingini, skulu møta oddaliðnum í Vodafonedeildini.

Heðin Askham er samdur við Sigfríð Clementsen í, at talan verður um tveir javnar hálvfinaludystir, har tað dagsformurin verður avgerandi. Tískil er tað sera týdningarmikið at vit eru væl fyrireikaðir til dystirnar móti B36, sigur fyrrverandi B36 venjarin.

Spurdur um hann metir tað vera fyrimun hjá EB/Streymi at hava heimavøll í seinra dystinum, sigur Heðin, at tað ber ikki til at siga.

– Um so er at vit fáa eitt gott úrslit í fyrra dystinum, kann tað hava týdning, men tað er ikki nakað sum vit kunnu brúka til nakað áðrenn tann fyrri dysturin er leiktur, sigur Heðin Askham í stuttari viðmerking til Sosialin.

### Núverandi og táverandi

Síðst B36 og EB/Streymur brustu saman í steypakappingini, var í finaluni í 2008, sum sundalagsmenn vunnu 3-2. Venjarin hjá EB/Streymi tá, var núverandi B36 venjarin, Sigfríður Clementsen, meðan táverandi venjarin hjá B36, Heðin Askham, ja hann stendur nú við stýrsivølin hjá EB/Streymi.

Spurningurin er so bara, hvør av teimum báðum dregur longra stráið móti sínum fyrrverandi liði.

Fyrri hálvfinaludysturin verður leiktur í Gundadali 20. mai, meðan returdysturin verður við Margáir 8. juni.



*Fuglfirðingar hava heimavøll í fyrra hálvfinaludystinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Eysturoyarlið bresta saman í hálvfinaluni

**LØGMANSSTEYPIÐ** Lutakastið vildi tað soleiðis at grannarnir úr Víkingur og ÍF bresta saman í hálvfinaluni

Ólavur Øre Hansen

Talan er um endurtøku av hálvfinaluni í steypakappingini frá í fjør, tá Víkingur vann. Venjarnir hjá ÍF og Víkingi vóru ikki nógv fyri at gera stórvegis viðmerkingar til lutakastið, men søgdu tó, at teirra lið vildu vinna kappingina, og tí skuldi hálvfinalan vinnast, óansæð hvat mótstøðuliðið var

Tað er lagt upp til eitt brak av einum dysti, tá ÍF og Víkingur bresta saman í hálvfinaluni í kappingini um Løgmanssteypið. Umframt at talan er um hálvfinaludystir, so er talan eisini eina grannauppgerð, og tað ger ikki dystirnar minni spennandi.

### Vit eru klárir

Ábraham Løkin, venjari hjá ÍF, sigur í stuttari viðmerking til Sosialin, at hansara menn eru klárir. – Vit taptu jú hálvfinaluna móti Víkingi í fjør, og tað hevur við sær, at vit eru bara enn meira uppsettir, sigur ÍF venjarin.

Spurdur um fuglfirðingar helst vildu sleppa undan at møta grannunum úr Gøtu og Leirvík, svaraði Ábraham, at tað kann gera tað sama. Skulu vit vinna kappingina, ja so skulu vit vinna óansæð hvat mótstøðuliðið er.

– Í so máta gevur tað bara meira brenni á bálið, at tað júst gjørdist Víkingur sum verður mótstøðuliðið, sigur Ábraham Løkin at enda.

### Dagsformurin verður avgerandi

Venjarin hjá Víkingi, Jógvan Martin Olsen, metir at tað verður dagsformurin, sum verður avgerandi í hálvfinaluni, tá Víkingur skal leika móti fuglfirðingum.

– Hóast ÍF ikki er nakar »ynski-mótstandari«, so gjørdi tað okkum tað sama, hvørjum vit skuldi leika ímóti í hálvfinaluni, sigur Jógvan Martin, og heldur fram, at liðini sum eru komin í hálvfinaluna eru øll sera sterk. Tískil verða tað truplir dystir óansæð hvørjum vit skuldu møta, sigur Jógvan Martin.

Av tí at øll liðini eru javnt sterk verður tað dagsformurin, sum verður avgerandi, metir Jógvan Martin.

Spurdur um sigurin á ÍF í hálvfinaluni í fjør, hevur við sær at Víkingar hava yvirtakið, sigur venjarin hjá Víkingi, – at tað er trupult at sammeta. Hetta tí fuglfirðingar hava fingið góðan styrk til hetta kappingarárið, meðan vit hava mist nakrar av berandi offensivu leikarunum frá í fjør. Tískil ber ikki til at sammeta støðuna í ár í mun til í fjør, sigur Jógvan Martin Olsen

### ÍF leikar heima fyrst

ÍF hevur heimavøll í fyrra hálvfinaludystinum, sum verður leiktur á Fløtugerði hósdagin 20. mai, meðan returdysturin verður leiktur í Sarpugerði týsdagin 8. juni.